# Fjallafípan fingið heimasíðu

Enn ein ansingarstovnur í Klaksvíkar kommunu hevur fingið heimasíðu. Hesaferð er tað Fjallafípan, ið hevur leitað sær út á netið. Heimasíðan kann røkkast á www. fjallafipan.fo. Steinbjørn O. Jacobsen, borgarstjóri tendraði fyri heimasíðuni. Fjallafípan er ein kommunalur stovnur, sum læt upp tann 1. september í 2002. Fjallafípan hevur dagliga 35 børn í aldrinum 4 til 7 ár.



*Íslendska stjórnin er ósamd um at taka hvalaveiðina uppaftur*

*Mynd: Morgunblaðið*

# Ósemja um hvalaveiði

Íslendska fiskimálaráðið kunngjørdi í gjár, at tað hevur gjørt av at loyva hvalabátunum at skjóta 40 sildrekar í ár. Avgerðin hevur sambært fiskimálaráðnum støði í samtyktini frá 2006 um at taka vinnuliga hvalaveiði uppaftur. Í fjør veiddu íslendingar seks sildrekar til vinnuligt endamál. Men stjórnin er ikki samd um avgerðina, tí seinnapartin í gjár kunngjørdi annar stjórnarflokkurin, Samfylkingin, at hann tekur ikki undir við avgerðini.

# nú

ton, hevur bygt.

- Neystið er uppkomið og er innlokað. Niðara hæddin er liðug við wc, brúsum, venjingarhøli og plássi til bátarnar, so hesir kunnu standa inni. Enn er ovara hæddin eftir, og nú stremba vit eftir at fáa hesa lidna.

Hon sigur, at tíverri er 10-mannafarið Vestmenningur ikki mannaður í ár, og tí er onkur av teimum, sum hevur róð við Vestmenningi, farin umborð á Kvívíking. Hinir báðir bátarnir, 5-mannafarið Havfrúgvin og 6-mannafarið Fortuna eru mannaðir.

## Stór undirtøka

Jóngerð fegnast um, at bátastevnan í Vestmanna hevur havt stóra undirtøku undanfarin ár.

- Í fjør, tá vit vóru so óheppin við veðrinum, vóru bátarnir einir 60-80 í tali, men nú veðurlíkindini tekna seg nógv betur, vænta – og vóna – vit, at bátatalið verður munandi størri.

Hon sigur, at eingin tilmelding er til bátastevnuna, men øll, sum eiga bátar og hava hug at verða við, eru meira enn vælkomin.

- Umstøðurnar í Vestmanna hjá bátum og bátaeigarum er betri nú, enn tá vit byrjaðu. Nú hava vit brúgvar, og bátarnir fáa bæði landstreym og vatn. Trygdin verður eisini í hásæti, tí vaktir verða við bátabrúgvarnar alla náttina, leggur Jóngerð aftrat.

Hon sigur, at bátarnir skulu møta við Fútaklett leygardagin klokkan 14.30, og síðan verður stevnt inn á Vestmanna, har bátarnir verða skrásettir, og alt bátsfólkið verður bjóðað heita suppu og okkurt leskandi í hølunum hjá gomlu Brandstøðini.

Umstøðurnar hjá stevnugestum eru eisini góðar í aðrar mátar, tí á økinum við skipasmiðjuna er pláss lagt av til húsvognar, har fólk, sum eiga slíkar, kunnu seta sínar vognar.

- Tað er ein heilt serligur dámur yvir Vestmanna og serliga yvir bryggjuøkinum eitt slíkt kvøld. Fólk vitja umboð á bátunum hjá hvørjum øðrum, og onkur steikir búffar, kókar fugl ella bjóðar føroyskan viðskera. Kanska hevur onkur eisini eina harmoniku, sum plagar at fella væl inn í stemningin.

Hon sigur, at leygarkvøldið fer stevnunevndin eisini at grilla stevnubúffar á bryggjuni, eins og Sámal Ravnsfjall og Jóan J. Guttesen fara at syngja og spæla – og á midnátt verður fýrverk sent á bryggjuøkinum.

- Jú, hetta er ein serligur dámur, sum má upplivast, leggur Jóngerð aftrat.

## Nógv á skránni

Leygardagin verður eisini bjargingarroynd á Vestmanna við bjargingarbátum og tyrlu.

Stubbin í Kvívík fer at hava framsýning av bátum og húsvognum Inni á Fjørð, og ungdómshúsið Staðið fer at hava listaframsýning við ungum og evnaríkum listafólkum. Í ungdómshúsinum fer Ása Wraae eisini at syngja.



*Bátarnir, sum luttaka á bátastevnuni í Vestmanna, skulu møta við Fútaklett leygardagin klokkan 14.30. Tað verður snotuligi sluppungin Ólavur, sum siglir fremstur inn á Vestmanna við fylginum*

Jóngerð sigur, at Fjørukrógvin verður opin í sambandi við stevnuna, og tað verða klædnahandilin Vestmóti og gávuhandilin Romantique eisini.

- Í Ítróttarhøllini verður ymiskt til børnini, eitt nú tombola, hoppiborg, fiskibrunnur, andlitsmáling – og har verður eisini bóltkast, sum eitt nú vestmenningum, sum spæla nógv hondbólt, plagar at dáma sera væl. Í Ítróttarhøllini verður eisini kaffisøla og søla av lutaseðlum.

Agnar Joensen fer eisini at leiga út sonevndar atvmotorsúklur til koyring Inni á Fjørð, har breyt er til endamálið.

Jóngerð Nielsen, forkvinna í VÍF, vísir annars til heimasíðuna hjá felagnum, www.vif.fo, har meira fæst at vita um bátastevnuna í Vestmenna og tey mongu tiltøk, sum fyriskipað verða í hesum sambandi.